F. S. F.

1 0 SEP 2007

Móttikið

**KÆRA 05/2007**

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Tilburður í dystinum VB/Sumba-EB/Streymur – illstøða millum venjara og leikara** | |
| Deild: Formula | Kapping: Landskapping |
| Brot framt: 06.08.2007 | Kæra innkomin: |
| Kærugjald goldið: Ja □ Nei □ | Kærufreist hildin: Eftir áheitan frá Starvsnevnd FSF's |
| Partshoyring við 5 daga freist: Ja □ Nei □ | Ummæli frá Starvsnevndini: Nei |
| Partshoyring við 3 daga freist: Ja □ Nei □ | Áheitan um munnliga viðgerð: Nei |
| Fordømi og úrskurðir: Ja □ Nei □ Kanska □ | |
| Yvirlit yvir skjøl o.a. próvtilfar í kærumálinum:<br>1) Dómarafrágreiðing<br>2) Frágreiðing frá VB/Sumba<br>3) Frágreiðing frá EB/Streymur<br>4) Kunnandi tilfar frá Dansk Boldspil-Union og Svensk Fotboll um revsing fyri líknandi mál í Danmark og Svøríki<br>5) Sjónvarpsupptøkur hjá Kringvarpinum av dystinum VB/Sumba-EB/Streymur leiktur 6. august | |

# AGANEVNDIN

## 1. Kærupástandir og grundgeving fyri kæruni

Hóast ongin formlig kæra er komin frá pørtunum í málinum, so hevur Aganevndin avgjørt at taka málið upp til kæruviðgerð sambært heimildini í grein 7, 3. punktum í Agareglugerðini, samanber eisini brot 2 niðanfyri. Aganevndin hevur avgjørt, at viðgera málið eftir hesum pástandi:

At venjarin hjá VB/Sumba eftir málið 1-2 til EB/Streym fór inn á vøllin og langaði við knýttum neva til ein av leikarunum hjá EB/Streymi, ið varð staddur á vøllinum skamt frá útskiftingarøkinum hjá VB/Sumba.

## 2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Aganevndin hevur eftir áheitan frá Starvsnevnd FSF's avgjørt at taka málið til viðgerðar sum kærumál sambært grein 7, 3. punktum í Agareglugerðini, sum samtykt á aðalfundi FSF's 3. mars 2007, hóast ongin formlig kæra er frá pørtunum í málinum.

Sambært grein 2 og grein 5 í Agareglugerð FSF's, hevur Aganevndin heimild at viðgera mál viðvíkjandi brot á regluverk FSF's.

Sambært artikkul 103 í FIFA Disciplinary Code eru sjónvarpsupptøkur viðurkent prógvgrundarlag í málum sum hesum.

## 3. Fakta í málinum

Sambært dómarafrágreiðingini eydnaðist tað ikki dómarabólkinum at síggja, hví ein klandurstøða tók seg upp úti við útskiftingarbenkurnar tá málið til 1-2 kom. Hinvegin vísir dómarin á, at "onkur frá EB/Streymi sigur seg verða slignan, og onkur frá VB/Sumba sigur seg verða groft provokeraðan."

VB/Sumba vísir í síni frágreiðing á, at umrøddi EB/Streyma-leikarin "kemur eftir málið til 1-2 til EB/Streym yvir ímóti og inn í útskiftingarumráðið hjá VB/Sumba og provokerar umboð fyri VB/Sumba, ið eru í hesum økinum, ið er teirra øki." Sambært frágreiðingini skapar hetta øsing "og elvir hetta ivaleyst til, at VB/Sumba venjarin ger sum hann ger". VB-Sumba vísir í síni frágreiðing eisini til Kringvarpsupptøkurnar av tilburðinum, ið hava verið vístar í 3-2 hjá Sjónvarpi Føroya 7. august 2007.

EB/Streymur vísir í síni frágreiðing á, at umrøddi leikarin longu í samband við eitt fríspark stutt undan málið til 1-2 til EB/Streym varð blivin provokeraður av einum hjálparmanni hjá VB/Sumba, sum "rópar okkurt ljótt" eftir nevnda leikara, tá hann er á veg av vøllinum eftir at hava hjálpt leikara, ið hevði fingið ilt í sambandi við nevndu frísparksstøðu.

Sambært sjónvarpsuppstøkunum hjá Kringvarpinum ber ikki til at staðfesta, um nevndi hjálparmaðurin hjá VB/Sumba hevur rópt nakað ljótt til umrødda leikara ella ikki.

Sambært sjónvarpsupptøkunum hjá Kringvarpinum ber heldur ikki til at staðfesta, um umrøddi EB/Streyma-leikarin veruliga fór inn á útskiftingarøkið hjá VB/Sumba eftir at EB/Streymur hevði lagt seg á odda 2-1.

Hinvegin kann tað sambært sjónvarpsupptøkunum hjá Kringvarpinum staðfestast, at venjarin hjá VB/Sumba – í sambandi við fagnaðin hjá EB/Streymi - fór út á vøllin við miðvísari kós móti umrødda EB/Streyma-leikara. Staðfestast kann eisini, at hóast eitt hjálparfólk legði seg ímillum og royndi at geva EB-Streyma-leikaranum skjól móti VB/Sumba-venjaranum, so eydnaðist tað VB/Sumba venjaranum við knýttum neva at langa til vinstra kjálka á EB/Streyma-leikaranum.

**4. Møgulig brot á lógir og reglugerðir hjá FSF sambært kærupástandum**

Aganevndin staðfestir, at ásetingar eru í regluverki FSF's og FIFA, sum beinleiðis og óbeinleiðis snúgva seg um ósømiligan atburð frá einum venjara á leikvølli. Í grein 2, stk. 1 í Agareglugerðini er ásett, at reglugerðin eisini er galdandi fyri brot á lógir og reglur hjá FIFA og tí kunnu FIFA-reglurnar eisini leggjast til grund í viðgerðini av málinum.

Sambært grein 23, stk. 3 í Kappingarreglunum hjá FSF er ásett, at "Tá ið dystur verður leiktur, má ongin koma inn á vøllin uttan við serligum loyvi frá dómaranum." Staðfestast kann, at venjarin hjá VB/Sumba fór inn á vøllin uttan serligt loyvi.

Í grein 32, stk. 1 er ásett, at "Dystir í lands- og steypakappingini skulu verða avgreiddir samsvarandi hesum kappingarreglum og ta til hvørja tíð galdandi STEVNU, sum F.S.F. ásetur og sum verður lýst í seinasta lagi ein mánaða áðrenn kappingarbyrjan." Í STEVNU 2007 er í broti A 3 hetta ásett um atburð, ið ikki verður góðtikin:
**"3. Bonkurin**
Venjari ella leiðari, sum, eftir dómarans metan, ber seg ósømuliga at kann átalast/ burturvísast av ítróttarøkinum. Dómarin skal tá, skrivliga, boða kappingarnevndini frá tilburðinum. Víst verður her til grein 36 stk. 5 í kappingarreglunum fyri fótbólt.
Niðanfyri nevndi atburður verður ikki góðtikin:
Heldur áfram við at ganga/standa á tekniska økinum, aftana at hava fingið átalu fyri tað.
Heldur áfram við at ganga uttanfyri tekniska økið, aftaná at hava fingið átalu fyri tað.
Nýtir háðandi orð ella atferð móti dómara, linjudómara ella 4. dómara sum mótmæli móti eini

avgerð.
Nýtir háðandi orð ella atferð móti persónum sum eru í tekniska økinum hjá mótstøðuliðnum, leikarunum á mótstøðuliðnum ella ákoðarunum á eini negativan hátt.
Fer inn á vøllin uttan loyvi frá dómaranum."

Aganevndin staðfestir, at eitt av aðalmálunum við hesi stevnu er at eggja til sonevnt fair play og góðan ítróttaratburð og –anda á leikvølli.

Aganevndin metir eisini, at atburðurin hjá VB/Sumba-venjaranum er fevndur av grein 36, stk. 5 í Kappingarreglunum um ósømiligan atburð á ítróttarøkinum. At dómarin ikki sá tilburðin skúgvar ikki nevndu áseting um ósømiligan atburð til viks.

Í lógum FSF's er í grein 13, stk. 1, litra i ásett, at limirnir í FSF hava skyldu til at "hava reglur í viðtøkum sínum um skyldu at halda grundreglurnar um loyalitet, integritet og góðan ítróttaratburð og reglur um fair play;"

Sambært FIFA Discplinary Code artikkul 50 og artikkul 57, eru bardagi og annar ósportsligur atburður álvarsligt brot á fótbóltsreglurnar. Í artikkul 50, stk. 1 er ásett: "Involvement in a brawl is sanctioned with a suspension for at least six matches." Í artikkul 57 er ásett: "Anyone who insults someone in any way, especially by using offensive gestures or language, or who violates the principles of fair play or whose behaviour is unsporting in any other way may be subject to sanctions in accordance with Art. 10 ff."

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin staðfestir, at venjarin hjá VB/Sumba undir dystinum fór inn á vøllin við beinari kós móti einum EB/Streyma-leikara, knýtti nevan og langaði til á vinstra kjálka á leikaranum. Illgerðin eydnaðist, hóast eitt hjálparfólk royndi at koma ímillum at verja EB/Streyma-leikaran.

Atburðurin hjá VB/Sumba-venjaranum er brot á grein 23, stk. 3 og grein 32, stk. 1 í Kappingarreglunum, umframt áseting A 3 í Stevnu 2007. Eisini er atburðurin fevndir av artikkul 50 og 57 í Disciplinary Code hjá FIFA um bardaga og ósportligan atburð, samanber eisini brot 4 omanfyri.

**6. Linnandi ella herðandi umstøður, ið hava týdning fyri metingina av málinum**

Aganevndin metir ikki, at nakrar linnandi umstøður eru, ið kunnu rættvísgera gerð og brot venjarans. Hinvegin metir nevndin, at miðvísa kósin hjá VB/Sumba venjaranum eftir tí ávísa EB/Streyma-leikaranum eru herðandi umstøður, av tí at hóast eitt hjálparfólk royndi at leggja seg ímillum, so helt VB/Sumba-venjarin áfram at elta EB/Streyma-leikaran til hann við knýttari hond hevði sligið hann í andlitið.

**7. Revsimøguleikar sambært lógum og reglugerðum FSF's**

Sambært grein 8, stk. 3 í Agareglugerðini, kunnu persónar sektast við átalu, ávaring, bót, leikbann, forboð fyri at vera í umklæðingarrúmum og útskiftingarbeinkinum, forboð fyri at vera á leikvølli ella forboð fyri at taka lut í virksemi, ið hevur við fótbólt at gera í eitt ávíst tíðarskeið.

**8. Týdningur av møguligum fordømum og úrskurðum í líknandi málum**

Aganevndin hevur í hesum máli leitað sær upp siðvenju í líknandi málum í Danmark og Svøríki og metir nevndin at revsingin í hesum máli skal verða lík tí, sum givin verður í hesum londum í

líknandi málum.

**9. Niðurstøða**

Venjarin hjá VB/Sumba hevur við sínum atburði undir dystinum 6. august broti lógarverk FSF's, Kappingarreglurnar, Stevnuna 2007 og FIFA reglur, sbr. brot 4, 5, og 6 omanfyri.

At ein venjari letur seg øsa fyri síðani – uttan serligt loyvi frá dómaranum - at fara inn á vøllin at elta og síðani sláa ein leikara á mótstøðuliðinum er ósømiligur atburður og brot á reglur FSF's og FIFA. Við sínum atburði hevur venjarin hjá VB/Sumba ikki bara brotið reglur um at fara inn á vøllin uttan serligt loyvi, men eisini grundleggjandi reglur um fair play, góðan ítróttaranda og fótbóltssið og er hetta sera ósømiligt fyri ein venjara og slíkur atburður kann á ongan hátt góðtakast á leikvølli. Aganevndin mælir tí eisini til, at felagið VB/Sumba, ið varðar av venjaranum, setur neyðug tiltøk í verk fyri at tryggja, at tilburðurin ongantíð endurtekur seg.

**10. Úrskurður**

Sambært grein 8, stk. 3, litra e í Agareglugerðini, hevur Aganevndin gjørt av at revsa VB/Sumba-venjaran við forboði at vera í umklæðingarrúminum og/ella at vera á útskiftingarbonkinum næstu 4 dystirnar hjá VB/Sumba í Formuladeildini.

**11. Upplýsing um kærumøguleika og freistir**

Sambært grein 12, stk. 2 kann avgerðin hjá Aganevndini ikki kærast til Yvirkærunevndina.

**12. Staður, dagfesting og undirskrift:**

**Tórshavn 10 / 09 - 2007**

Anni á Hædd

Anni á Hædd, formaður